# Politiska støðan og søgan í sama viðfangi – Óli P

## 17. BÓKAÚTGÁVAN HJÁ ÓLA P

*Tórbjørn Jacobsen*




*– Óli P. er hin føroyski Charlie Chaplin. Eitt ófatiligt yvirlit, innlit og eini skapanarevni, sum bara eru heilt fáum menniskjum beskorin. Fleiri megna at karikera ein politikkara, men at plasera hendan inn í alla seansuna og politisku støðuna í sama viðfangi, at lýsa politisku søguna dag fyri dag í fáum strikum, og at fáa alt at ganga upp í eina hægri listarliga eind, tað avrikið megnar bara geniið, segði Tórbjørn Jacobsen m. a. í heilsan til Óla P, tá 17. bókin var framløgd í Miðlahúsinum*

Líkamikið hvaðar leiðin gongur, havi eg altíð tvær bøkur í viðførinum. Onnur teirra er "Í GRØNLANDI VIÐ KONGSHAVN". Fremsta prosa nýbrotið í føroyskum skaldskapi í okkara tíð. Ein merkiliga ótømandi kelda. Magnus arbeiddi eitt skifti á prentsmiðjuni, har eitt annað nýbrot í føroyskari list varð prentað: Rukkulakkin. Hann helt Klaksvíks-humorin vera eyðkendan: "Í mun til tann "fína" í Havnini er hesin "spoyskur". Nú er onki niðursetandi meint við, at klaksvíkingar eru spoyskir. Munur er á skemti og óreinheit, men lítil er hann." Havnin er rokok ímeðan Klaksvíkin er barok. Hóast Rukkulakkin var ætlaður norðoyingum, vit minnast lýsingina, smiðjan á Stongum ger nógv burturúr ongum, so mundi flogið vera hægri enn í øðrum lokalum sproytum, táið tað eisini kundi hava áhuga hjá einum pilti í Eysturoynni um tað mundið. Onki verður tikið frá nøkrum, um sagt verður, at kroppurin ið bar veingirnar, var Óli Petersen - Óli P.

Eisini í Gøtu bíðaðu menn spentir eftir hesum satiriska teiti. Ár undan ári. Allir fóru teir ikki á Norðoyastevnu, men Vangberg seldi dastið av bløðum, sum vórðu givin út í danska ríkinum, og soleiðis mundi hann eisini metta svongdina og sløkkja tostan eftir úrmældu lýsingunum - av originalunum eystanfyri Djúpini og Leirvíksfjørð.

Í einum nostalgiskum roða harmast tey flestu, at Óli slepti Rukkulakkanum, kanska gjørdist hann ov bundin í einum ov avmarkaðum øki, sleit seg harvið leysan, og menti seg kanska av somu orsøk til ein sess á hválvinum, har bara teir alra bestu satirikararnir eiga ein sess. Í Dimmalætting og í nógv tey seinastu árini á baksíðuni í Sosialinum.

Í filmslistini tosa teir um sálarligu, autentisku og ta satirisku andlitsmyndinaportrettið. Dømið um fyrstu sjangruna er kykmyndin "Nixon" hjá Oliver Stone. Dømið um aðru sjangruna er fantastiska lýsingin av seinastu døgum Hitlers í filminum "Der Untergang" hjá Oliver Hirschbiegel og dømi um seinast nevndu sjangruna er "Einaræðisharrin" hjá Charlie Chaplin, sum hann skapti longu í 1940. Serligu eyðkennini hjá yvirnazistinum vera vaksin, bend og boygd soleiðis, at tey smella í eyguni sum grotesk og láturlig. Eftir tað kunna øll putlast við myndina, hvør í sínum hugaheimi, í satiruni er høgt til loftið og vítt til veggja, soleingi tað er skemtiligt og persónarnir eyðmerktir. Í satirunnar karikeraða universi verður kritikkurin tongforloystur ígjøgnum humorin, og humorurin víðkar mørkini fyri tí sum kann góðtakast.

Óli P. er hin føroyski Charlie Chaplin. Eitt ófatiligt yvirlit, innlit og eini skapanarevni, sum bara eru heilt fáum menniskjum beskorin. Fleiri megna at karikera ein politikkara, men at plasera hendan inn í alla seansuna og politisku støðuna í sama viðfangi, at lýsa politisku søguna dag fyri dag í fáum strikum, og at fáa alt at ganga upp í eina hægri listarliga eind, tað avrikið megnar bara geniið. Sjálvt um hann ongantíð var í Mentamálastýrinum í mínari tíð, á Hoyvíksvegi 72, so má í eftirsjónini ásannast, at hann var beistagtiga beinrakin. Hvør minnist ikki myndina, eftir at grýtulappafólkini úr Vestmanna høvdu verið á vitjan, og ráðharrin í sinnismuni gjørdi pelastikk á eina av standlampunum, høgdi sleggjuna í ibenholt- skrivaraborðið og trúnaðarskjølini flugu um oyrini á honum. Arvurin eftir Signar skuldi knúsast fyri ævir allar. Sjálvt heimsgitni rebellurin Ché tóktiskt skelkaður á bróstinum, ei undir í at seigligu seminaristarnir norðan í frá fingu sær ein ordans hvøkk hendan dagin.

Tað er ongin loyna at fyrrverandi danski uttanríkisráðharrin Per Hækkerup, sáli, er ein av mínum stóru politisku fyrimyndum. Óræddur. Og hóast tað onkuntíð gekk av skriðuni við kemiini hjá honum og Krag, so man hetta vera eitt tað sterkasta toymið danskur politikkur hevur átt. Klassiska samstarvið millum intelligenta asketin og bamsuna, sum valdi at royna seiggið í mannakroppinum ígjøgnum kubanskar vindlar, skotskt whiskey og drúgvar vøkunætur. Í endurminningunum sum Nikolaj Bøgh gav út fyri kortum, skrivar hesin, at tað fyrsta Per spurdi embætismenninar, táið hann kom inn á stjórnarskrivstovuna um morgnarnar var, um hann var avmyndaður í karikaturtekningunum í morgunbløðunum. Hann var sannførdur um, at ein politikkari sum ikki tíðum varð karikeraður í avísunum, hevði lítið og onki uppá seg.

Er hesin spádómurin eftirfarandi, tá var tað onki løgið í at Finnbogi Ísakson, sáli, tóktist so rankur og var Óli P.-fjeppari um ein háls og at vit báðir Høgni Hoydal nú ganga við røttum ryggi, - sum spelknir lundar. Tað eru tjóðveldisfólk, ið halda, at Høgni er meginaversiónin hjá Óla. At hesin er ov meinsøkin, onkur heldur enntá, at hann er úti eftir honum politiskt. Hetta er tvætl. Havi ferðast saman við Hoydal í silvitni og í ringasta ódnarveðri á politisku barrikadunum hesi seinastu 7-8 árini. Veit onki um, at hann hevur tikið sær tyknið av strikunum og lýsingunum undan meistarans hond innan av Skála. Sum fremsti avísnarkomanur í landinum er hann altíð fyrstur eftir baksíðuni á Sosialinum. Bitin, sum hann er av teknirøðini Lucky Luke, heldur hann tað tó vera løgið, at Óli hevur valt sær hin illa sinta Avarell til skabelón, táið hann teknar RUC-kapteynin í tjóðveldinum. At ekstremiteturin verður alin fram í attitýduni, er væl onki løgið, hetta er oddvitin í flokkinum, sum ætlar sær at kollvelta neyðarsligu ríkisrættarligu viðurskiftini føroyingar liva undir. Tað ger ongin deyðkomin maður.

Javnaðarmenninir hava minst líka stórir orsøkir fyri at argast. Eidesgaard verður aloftast teknaður sum eitt politiskt, ideologiskt og visionert hým. Sum ikki ætlar sær annað enn at vera kleyvarkongur í danska støðuhylinum. Hekk klæðningsjakkin ikki fastur undir danska hválvinum, í einum akslatræði, krakeleraði kroppurin. Hvat annað enn vónloysi skal eisini ganga út úr myndini av manninum, ið hevur sett sær fyri at spleysa teir tríggjar samgonguflokkarnar saman í eitt søguliga paradoksalt konglomerat, bara í royndini at koma sær í søguligu annalirnar sum løgmaður Føroya frá 2004 - 2008?

Havi ein mistanka um, at formurin undir mær sjálvum í tekningunum, er hin trivaligi Baldrian í gomlu Barnabløðunum. Ið sum oftast kom sær út í okkurt óvæntað. Oftani lítið umhugsaðar og harvið óhepnar støður. Anarkistiska bamsan, sum ongin megnar at halda í tjóðri, alra minst Høgni Hoydal. Buldribassin, sum valdi at tráðroyna mannakroppin og liva lívið ígjøgnum hálendskar ballvindlar, eingilska ginnið og drúgvar vøkunætur.

Óli P. er kendur víða um lond. Veit at hann verður brúktur í undirvísingartilfarinum á journalistiskum háskúlum. Onkuntíð plagdi Jan at geva mær eintøk av bókunum har tekningarnar vóru savnaðar, at lata donskum politikkarum, táið eg hóreiggjaði mær á bonaðu gólvunum á Christiansborg. Væl dámdi teimum, serliga Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra, táið eg plagdi at geva honum tekningarnar av okkum báðum í víggi og skuggaboksing um Republikkina og danska Eindarstatin.

Dømi um góðu eygleiðaraevnini, var ta ferðina, hann hevði teknað eina av hesum mest grotesku myndunum av mær. Akaði yvir um fjørðin. Brásteðgaði niðanvert hús hansara. Hoyrdi seinri at Susanne Barding var bebbarædd, roknaði við at hesin ørligi tjóðveldismaðurin var komin at gera enda á manni hennara. Trivaliga bamsan leyp út úr bilinum og flýggjaði Óla P. eina rækjueskju av Grønlandsmiðjunum afturfyri tekningina, sum eg sjálvandi var serliga fegin um. Minnist, at eg var í hvítbotnaðum gummiskóm ta ferðina, og síðani havi eg verið avmyndaður í hesum slovakiska produktinum allar ferðirnar eg eri runnin úr fingrunum á stóra listarmanninum úr Klaksvík. Fyri Susanne mundi hetta kennast sum eitt rættiligt paradoks og helst eisini eitt dømi um hvussu serligur føroyskur politikkur er.

Umframt alt sum skrivað er omanfyri, skal sigast, at tað er gott hugskot at geva tekningarnar út í bók. Skimmar tú ígjøgnum tær, fært tú eina góða mynd av politisku gongdini tað árið. Har er ongin óreinheit, bara skemt og spoyskni. Og Óli hevur eisini tey merkiligu evnini, at hann oftani sær longur inn í politisku framtíðina enn politikkararnir gera. Megnar betri í fáum strikum at lýsa politisku støðuna - enn onnur duga at siga hana í orðum. Kanska er hann einasti kritiski fjølmiðlamaðurin, sum er eftir í landinum, sum megnar at fara inn undir roðið á maktini og gera bart. Hjartaliga tillukku við teimum sjúti góði vinur og mong góð ár afturat á baksíðuni í Sosialinum. Tað ganga ættarlið ímillum eitt talent við tínum formati. Jan hevur tørv á tær, føroyingar hava brúk fyri tær og politiska maktin hevur gott av tínum hvassa liggja.